# HEILSANIR



**Góði fitti abbi**
Hjartaliga tillukku á føðingardegnum. Nógv góð ár í framtíðini. Her høvdu vit ein fínan túr. Tey allarbestu ynskir frá
**Abbabørnunum**



**Góði elskaði Hallgrím**
Hjartaliga tillukku við degnum 27. febr. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**



**Góði lítlibeiggi**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í morgin.



**Halló hold 75**
Síggjast leygarkvøldi?



**Góða elskaða Durita**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Vit elska teg.
**Ynskja omma og abbi**

Øllum tykkum sum gleddu okkum so stórliga á gullbrúdleypsdegi okkara 20. novembur 2004, takka vit hjartaliga, og senda tykkum okkara bestu heilsur við Sálm 115,15.

Ein serstøk tøkk til børn, svigarbørn og barnabørn okkara, ið tóku so væl um okkum henda merkisdag. Somuleiðis vinir og kenningar, tit sum sungu, spældu, yrktu og ikki at gloyma tykkum sum sungu henda vakra morgun við heim okkara. Hjartans tøkk øll somul.

Eisini takkað vit øllum sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gleddu okkum.

Samkoman í Betesda fær hjartans tøkk fyri at vit kundu nýta húsið til hesa gleðiríku løtu.

Til seinast ynskja vit øllum eitt av Harranum signað nýttár við bestu heilsum.

*Gretha og Levi*



"Higartil hevur Harrin hjálpt. Ebenezer" 1 Sám 7,12

# Ergo- & Hjálpitól í nýggj høli



*Í løtuni verða nýggju hølini umvæld og klárgjørd til nýggja virksemið*

S P/F Ergo & Hjálpartól við Beintu við Sandá Lassen hevur keypt " Palle Bager´s hús ", eisini nevnt húsini hjá Conrad Skaale í J. C Svabosgøtu í Havn.

Ergo & Hjálpartól hevur higartil hildið til í leigaða bygninginum við síðuna av Palle Bager. Í tíðindaskrivi sigur Beinta Lassen, ergoterapeutur, at hon fegnast um góðu gongdina, sum hevur gjørt tað møguligt at ogna sær bygningin, sum er uml. 400 fermetrar til støddar.

Í nýggja bygninginum fer Ergo & Hjálpartól at víðka um virksemi sítt, og fær umframt nógv størri framsýningar- og handilshølið, eina munandi betri viðgerðastovu til ergoterapiina sum felagið eisini umfevnur.

Í løtuni verða hølini umvæld, men so skjótt hetta arbeiðið er liðugt, verður virksemið flutt.

-jm



**Góði Fríði**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum 26. febr. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, pápi og Mads**



**Góði Símun Pauli og Brynhild**
Hjartaliga tillukku við 5 og 2 ára døgunum, sum eru nú leygardagin og komandi. Vit elska tykkum.
**Heilsan mamma, babba og Lisa**